## Mítt summarlag

***Tónleikurin fyllur nógv í føroyska summarinum í gøtum og strætum, á bøum og á strondum, á festivalum og á møtum. Men summarið fyllur eisini í tónleikinum. Nógv løg finnast, ið nærum eru um at bresta av summari. Vit hava spurt nøkur fólk um teirra summarløg.***

# Flovisligt men erligt

Tónleikurin fyllur nógv í føroyska summarinum í gøtum og strætum, á bøum og á strondum, á festivalum og á møtum. Men summarið fyllur eisini í tónleikinum. Nógv løg finnast, ið nærum eru um at bresta av summari. Vit hava spurt nøkur fólk um teirra summarløg.

Henning Nicodemussen er serliga kendur sum trummuleikarin í All That Rain, men hevur áður sitið handan trummurnar hjá bólkum sum Geislum, Wolfgang og Kjølum. Henning er útbúgvin grafikari og starvast til dagligt hjá Petur & Petur. Spurdur um hansara summarlag viðgongur Henning, at svarið er erligt, men eisini eitt sindur flovisligt.

– Mítt yndis summarlag er tadaaa: Walking on Sunshine hjá Katrina and the Waves frá 1985. Tað er eingin sum helst dýbd í hesum lagi, og boðskapurin er sera einfaldur ”at føla seg væl”. Lagið er eitt typiskt upbeat-feelgood 80’ara-lag við 60’ara poppljóði. Teksturin hevur sum so einki við summar at gera, men meira um tað klikkaða følilsi í kroppinum, tá ein er forelskaður. Eg havi sum so einki at forbinda lagið við, fall fyri tí fyri umleið fimm-tíggju árum síðani, tá tað bleiv nýtt til eina summarlýsing fyri Canal+. Stutt eftir keypti eg tað á eini ”Absolute 80’s” fløgu. Havi eisini hoyrt og spælt lagið nógv í vertskapi. Lat okkum siga tað, at um eg átti hetta á eini vinyl-plátu, hevði hon nokk ikki verið spælandi í dag. Klári faktisk ikki at sita, standa ella liggja stillur, tá eg hoyri hetta lagið. Tað fyllir mína sál við sunshine. Fitt ha ?? - kanska eg eri bara ein simpul upbeat 80’ari.



*“Walking on Sunshine” hjá Katrina and the Waves er yndis summarlagið hjá Henning Nicodemussen, sum er kendur sum trummuleikari í All That Rain*



















